# Ársfrágreiðing 2015 – Krabbameinsfelagið

- **GRANSKING**
- **FYRIBYRGING**
- **RÁÐGEVING, STUÐUL OG RØKT**

## Krabbameinsfelagið

Grønlandsvegur 58
Postboks 1216
110 Tórshavn
Telefon: 31 79 59
Heimasíða: www.krabbamein.fo
T-postur: kmf@krabbamein.fo

Starvsfólk
Dagligur leiðari:
Jansy Gaardlykke
Ráðgevandi sjúkrarøktarfrøðingur:
Sólrun Jacobsen
Skrivstova:
Poula Norðbúð

## Nevndin í Krabbameinsfelagnum

| | |
|---|---|
| Formaður: | Jákup N. Olsen |
| Næstformaður: | Sonja Nielsen |
| Kassameistari: | Agnar á Dul |
| Nevndarlimur: | Katrin Kallsberg |
| Nevndarlimur: | Durita Tausen |
| Tiltakslimur: | Martin Joensen |
| Tiltakslimur: | Jóhan Poulsen |

## Hjálpargrunnurin

Jákup N. Olsen
Katrin Kallsberg
Jónvør Christiansen

## Team Rynkeby Føroyar

Elmar Ósá
Katrin Kalsberg
Jákup N. Olsen

# Innihald


| | |
|---|---|
| Fororð | 3 |
| Átøk, samstørv og annað virksemi | 4 |
| Ráðgevingarstova og hjálparbólkar | 6 |
| Virksemi í ymsu bólkunum | 7 |
| Tilboð til sjúklingar og avvarðandi | 8 |
| Krabbameinshagtøl | 9 |

# Fororð



Enn einaferð kunnu vit ásanna, at Krabbameinsfelagið eisini í 2015 hevði stóra vælvildi millum føroyingar. Tað merkja vit bæði frá myndugleikum, privat-persónum, fjølmiðlum, sjúklingum og avvarðandi.

Hetta eru vit takksom fyri og gera okkara besta, fyri at liva upp til hesa vælvild. Vit halda, at tað kemst av, at vit í felag hava megnað at arbeitt miðvíst fram móti málinum. Tað munagóða arbeiðið, sum øll tey sjálvbodnu gera og nýggir hættir at fáa inntøkur til felagið, eru høvuðsorsøkirnar til hetta.

## Grannakaffi

Tiltakið Grannakaffi kom í lag, tá ið Urd Johannesen setti seg í samband við Krabbameinsfelagið. Hon hevði fingið hugskotið úr Bretlandi. Vertirnir fyri Grannakaffi bjóða grannum, vinum og øðrum á gátt til ein drekkamunn, eitt prát, eina uppliving ella okkurt heilt annað. Gestirnir fara á gátt hjá einum granna, vini, bindiklubba, skúlaflokki ella undirhúsi - og rinda fyri drekkamunnin ella tað, sum verturin vartar upp við. Gesturin rindar eftir førimuni, í trúnaði og hvør króna ger mun.

## Spyr.fo

Spyr.fo er ein nýggjur og øðrvísi háttur at gera skjótar og bíligar spurnar-kanningar millum føroyingar. Spyr.fo vendir sær til føroyska vinnulívið, skúlar, stovnar, felagsskapir, marknaðarfólk, fjølmiðlar og onnur, ið hava tørv á at gera álítandi spurnarkanningar.

Eitt, ið er serligt við nýggju tænastuni er, at hvørja ferð ein fyritøka, stovnur, felagsskapur ella onnur gera eina spurnarkanning, stuðla tey samstundis Krabbameinsfelagnum.

Spyr.fo hevur í samráð við Krabbameinsfelagið gjørt av at lata stuðulin til fyri-byrging og upplýsing um bróst- og prostatakrabba, ið eru størstu sjúklinga-bólkarnir hjá kvinnum og monnum.

### Team Rynkeby Føroyar

Eisini inntøkur frá Team Rynkeby Føroyar hava gjørt okkum før fyri at hjálpa, so tað veruliga munar. Fleiri familjur við børnum við krabba fingu fíggjarligan stuðul. Vikuskiftið 14.–17. august varð skipað fyri bólkaferð til Edinburgh fyri familjur við børnum, sum hava ella hava havt krabbamein. 23 fólk vóru í ferðalagnum og túrurin var sera væleydnaður.

At vit fáa fleiri inntøkur ger, at vit betur kunnu røkka málinum hjá Krabbameins-felagnum: at hjálpa krabbameinssjúklingum, teirra avvarandi og stuðla gransking innan krabbamein.

Eg vil nýta høvi at takka øllum, sum varða av krabbameinsøkinum, fyri gott samstarv.

*Jákup N. Olsen, formaður.*

## Átøk, samstørv og annað virksemi í 2015

### Krabbameinsfelagið skipaði fyri gangi ½ maratoni

Tað er mangan drúgvur dystur at stríðast við krabba. Við at ganga hálvt maraton vilja vit í Krabbameinsfelagnum gera vart við tað stríðið.

Hetta er eitt høvi, har vit við takksemi kunnu gleðast um lívið, kunnu stuðla teimum, sum stríðast, og kunnu takka fyri stuðul og umsorgan.

125 fólk gingu ½ maraton hjá Krabbameinsfelagnum, sum var í samband við Tórshavn Maraton leygardagin 13. juni í 2015.

### Løgtingið hevur samtykt 18 ára aldursmark fyri at taka solariumsól

Krabbameinsfelagið fegnast um, at 18 ára aldursmark endiliga er samtykt. Móðurmerkjakrabbamein er eitt álvarsligt vandamál í øllum Norðurlondum, og flestu Norðurlond hava longu 18 ára aldursmark. Við hesum verður stig tikið til at verja børn og ung undir 18 ár. Hetta er eitt greitt og týdningarmikið signalvirði til eitt nú foreldur.

Uppskotið er tó samtykt í skerdari útgávu, sum merkir, at tað framvegis verður loyvt almennum stovnum, t.d. svimjihallum, at bjóða solariumsól.

Samtykta solariumlógin tekur ikki støðu til ómannaðar sólstøðir. Upprunaliga var annars ætlanin, at ómannaðar sólstøðir skuldu bannast, tí tá er ógjørligt at hava eftirlit við aldursmarkinum. Hetta kravið var ikki við í uppskotinum hesaferð. Tað vil siga, at einki forðar ungfólki undir 18 ár at leggja seg undir solariumsól á ómannaðum sólstøðum. So kann verða spurt, um vandamálið, við at ung og børn taka solariumsól, verður mett at vera loyst við hesi lógini.

## Krabbameinsfelagið var við á fólkafundi í Tórshavn

Í september var Krabbameinsfelagið við á fólkafundi í ítróttarhøllini á Hálsi í Havn. Felagið hevði ein bás, har kunnað varð um felagið.

Guðrið Andorsdóttir, stjóri í Ílegusavninum, helt fyrilestur um møguleikar at granska í krabbameini í Føroyum.

Básurin hjá Krabbameinsfelagnum varð væl vitjaður.

## Aðalfundur hjá ECL í Belfast

Í sambandi við aðalfundin hjá evropeisku krabbameinsfeløgunum, sum var í Belfast, var boðið til móttøku á ráðhúsinum hóskvøldið 12. november 2015. 22 lond vóru umboðað á fundinum. Jákup N. Olsen, formaður og Durita Tausen, nevndarlimur, vóru við fyri Krabbameinsfelagið.

## Væleydnað skeið í Lívssamrøðu

Í heyst skipaði Krabbameinsfelagið fyri skeiði í Lívssamrøðu. Skeiðið var fýra dagar og eydnaðist sera væl. 15 fólk, úr ymsum fakbólkum, vóru á skeiði. Fakbólkarnir vóru m.a. sjúkrarøktarfrøðingar, sálarfrøðingar, heilsusystrar, námsfrøðingar, sosialráðgevar og heilsurøktarar.

## Heimasíðan hjá Krabbameinsfelagnum í nýggjum hami

Leingi hevur Krabbameinsfelagið arbeitt við at gera nýggja heimasíðu. Gamla heimasíðan hjá Krabbameinsfelagnum var vorðin ov gomul, tað var ringt at finna tað, ein hevði tørv á. Tí varð stig tikið til at gera nýggja heimasíðu við vøkrum einfaldum sniði og við fleiri møguleikum. Vit eru sera fegin um at hava fingið eina góða og snøgga heimasíðu.

## Grannakaffi

Tiltakið Grannakaffi er ein liður í støðuga arbeiðnum hjá felagnum, men hevur sín uppruna í spurninginum "hvussu kann eg hjálpa?" og byggir á tað, sum vit føroyingar frammanundan duga serliga væl; at stákast og skipa fyri hugnaløtum.

Vertirnir fyri Grannakaffi bjóða grannum, vinum og øðrum á gátt til ein drekkamunn, eitt prát, eina uppliving ella okkurt heilt annað. Tað verður latið einstaka vertininum upp í hendi at seta sín dám á tiltakið, so leingi tað ikki er í stríð við virðini hjá Krabbameinsfelagnum.

Gestirnir fara á gátt hjá einum granna, vini, bindiklubba, skúlaflokki ella undirhúsi og rinda fyri drekkamunnin ella tað, sum verturin ger av at varta upp við. Gesturin rindar eftir førimuni, í trúnaði og hvør króna ger mun.

Málið við tiltakinum var at fáa einar 100 vertir kring landið, og at savna inn 300.000 kr. Tá ið avtornaði, høvdu einir 110 vertir havt Grannakaffi, og á leið hálv millión krónur vóru savnaðar inn til Krabbameinsfelagið.

**Team Rynkeby Føroyar fyri aðru ferð**
Á samkomu í Öström í Tórshavn takkaði Team Rynkeby Føroyar liðið 2015 fyri seg og handaði Krabbameinsfelagnum 805.000 krónur, sum vóru savnaðar inn.

46 súkklarar og 10 hjálparfólk høvdu síðan september mánað 2014 savnað pening inn til børn við krabbameini og familjur teirra. Mesti peningurin kemur frá sponsorum, men eisini frá tiltøkum, so sum gallakvøldinum á Hotel Føroyum.

Í Føroyum eru tað millum eitt og tvey børn um árið, sum fáa krabbamein. Tað eru nýggir tilburðir.

Ein av stóru avbjóðingunum hjá okkum er, at børn við krabbameini mugu uttanlands til viðgerðar – og ofta er viðgerðin drúgv. Umframt stóru menniskjaligu avleiðingarnar av hesum, hevur hetta stórar fíggjarligar útreiðslur við sær, tí foreldrini mugu ofta vera burtur frá arbeiði fyri at vera hjá barninum.

Peningurin, sum kemur inn, verður nýttur til hesi trý øki:

- Fíggjarligan stuðul til børn, sum fáa krabbamein, og familjur teirra.

- Granska krabbamein hjá børnum.

- Foreldrabólkin hjá Krabbameinsfelagnum, sum tekur sær av áhugamálum hjá familjum við børnum við krabbameini.

## Ráðgevingarstova og hjálparbólkar
Á ráðgevingarstovuni hjá Krabbameinsfelagnum hevur sum undanfarin ár verið nógv samskifti og samband við fólk við krabbameini, avvarðandi og onnur.

Tveir ráðgevandi sjúkrarøktarfrøðingar starvast hjá Krabbameinsfelagnum. Tær vegleiða, hava telefonviðtalu og beinleiðis samtalur við sjúklingar, familjur og avvarðandi. Sjúklingum stendur eisini í boði at gerast partur av samtalubólkum og sjálvhjálparbólkum. Eisini er ein sosialráðgevi knýttur at felagnum.

Krabbameinsfelagið er talurørið hjá krabbameinssjúklingum og teirra avvarandi. Tað er tí fremsta uppgávan hjá starvsfólkunum at varnast tørv og áhugamál hjá krabbameinsraktum, at menna tænastur og at skipa samskiftisátøk hareftir.

## Nógv virksemi í ymsu bólkunum

Skipað hevur verið fyri bæði fyrilestrum, hugnaløtum og øðrum átøkum.

**Prostatabólkurin:** Prostatabólkurin hevur havt fleiri fundir, og undirtøkan hevur verið sera góð. Formaðurin í bólkinum, Eirikur Ólason Simonsen, var á landsfundinum hjá PROPA.

Í døgunum 12. og 13. februar í 2015 skipaði prostatabólkurin fyri undirvísing og kunnandi tiltaki um, tá ið krabbamein ávirkar seksualitetin. Tað vóru Anette Mikkelsen og Birgitte Laursen frá Sexologisk Center í Aalborg, sum stóðu fyri undirvísingini.

**Bót til Bata:** Fleiri av kvinnunum í Bót til Bata vóru vertir, hjálptu til ella søgdu sína søgu í samband við Grannakaffi 2015.

Í mai mánaði skipaði bólkurin fyri hugnaløtu í Runavík, har evni var 'At vera makin'. Maður eina kvinnu við bróstkrabba segði frá, hvussu tað er at vera maður og pápi.

Í august mánaði varð skipað fyri norðulendskum samstarvsfundi í Havn. Fundurin eydnaðist sera væl. Umboð frá systurfelagsskapum í Danmark, Svøríki og Noregi vóru á fundinum. Til umrøðu var viðgerð fyri bróstkrabba og rætturin til somu og bestu viðgerð.

Oktober er bróstkrabbamánaður. Í hesum sambandi skipaði bólkurin fyri fleiri tiltøkum fyri at varpa ljós á bróstkrabba. "Renn fyri bróstini" var í Vágum. Tað var sera góð undirtøka hóast vánaligt veður við nógvum regni. Tiltakið endaði við konsert og framløgu.

Eisini var skipað fyri evniskvøldi á Torginum í SMS. Evnið var "tá ið mamma gjørdist sjúk". Dóttir og móðir søgdu sína søgu. Bólkurin seldi armbond tilevnað úr leðri og silvuri, sum Turið Mohr hevði sniðgivið, og oyraringar, sum Elin Lindenskov hevði gjørt úr endurnýtslutilfari.

**Undirlívsbólkurin:** 7. mars fylti undirlívsbólkurin 10 ár.

Dagurin varð hildin við stórfingnari ráðstevnu um krabbamein í undirlívinum. Pernille Jensen, yvilækni, PHD, frá Gynækologisku deild á Odense Universitetshospitali hevði fyrilestur. Eisini var skipað fyri verkstovum og aftankvirru. Dagurin eydnaðist sera væl.

Tvey umboð fyri undirlívsbólkin vóru á ráðstevnu hjá KIU, sum er danska felagið fyri kvinnur við undirlívskrabba.

**Móðurmerkjabólkurin:** Móðurmerkjabólkinum hevði fund í februar og november. Tað er gott hjá limunum at hittast við sínum líkum, og at kunna umrøða smátt og stórt, sum hevur við móðurmerkjakrabba at gera.

Norðurlendska samstarvið 'Sikkerhed på solferie' hevur regluligt t-postsamskifti. Endamálið er at eggja til tryggar vanar á ferðum sunnanfyri. Tað verður gjørt við upplýsing áðrenn ferðina, gera vart við, hvussu týðandi tað er at vera í skugga heitastu tíðina á degnum og at brúka skil á ferðini.

**Foreldrabólkurin:** Foreldur at børnum við krabbameini hava skipað fyri fleiri hugnaløtum í 2015. Vanligt er, at tey møtast heima hjá onkrum í bólkinum. Fleiri í bólkinum vóru á árligu gallaveitsluni hjá Team Rynkeby Føroyar, sum varð hildin á Hotel Føroyum í ferbuar. Í august varð skipað fyri vikuskiftistúri til Edinburgh, foreldur og børn vóru við á túrinum, umframt starvsfólk frá Krabbameinsfelagnum. Eins og undanfarin ár skipaði bólkurin fyri jólaborðhaldi.

**Stomibólkurin:** Stomiambulatoriið á Landssjúkrahúsinum hevur skipað fyri einum kvøldi at undirvísa fólki, ið hava stomi, og teirra avvarðandi.

## Tilboð til sjúklingar og avvarðandi

### Samtalubólkur fyri tey, sum hava mist makan

Endamálið við at savna fólk, ið hava mist makan, er at geva tí einstaka møguleikan at seta orð á og viðgera tær kenslur, tankar og trupulleikar, sum eru, tá ið tú missir makan. Samtalurnar við onnur í somu støðu kunnu stuðla og styrkja víðari í lívinum.

### Skeið í húð- og andlitsrøkt fyri kvinnur við krabbameini

Krabbameinsfelagið hevur saman við Make-up Store skipað fyri skeiði í andlits-røkt og at smyrja sær. Skeiðið er fyri kvinnur við krabbameini. Skeiðið er ókeypis.

### Familjudagur við Gjógv

Í september varð skipað fyri væleydnaðum degi á Gjáargarði fyri familjur við børnum, sum hava mist foreldur av krabbameini. Skótahjálpin stuðlaði tiltakinum.

### Familjusamtalur

Familjusjónarhornið hevur stóran týdning í ráðgevandi arbeiðinum hjá felagnum. Tá ið ein í familjuni gerst sjúkur ella doyr, rakar tað alla familjuna, eisini børnini.
Endamálið við familjusamtalum er, at øll í familjuni í felag fáa sett orð á tað, sum er svárt og torført. Á tann hátt fáa hjálp til í felag at stuðla og hjálpa hvør øðrum.

### Listterapi

Í ár var aftur skipað fyri listterapi-skeiðum fyri fólki, sum hava, ella hava havt krabbamein.

# Krabbameinshagtøl í 2015

Tilsamans vóru 235 nýggir tilburðir av krabbameini staðfestir í Føroyum í 2015.

Bróstkrabbi er vanligasta slagið av krabbameini hjá kvinnum. Hesi seinastu sjey árini eru millum 20 og 25 tilburðir staðfestir árliga.

Prostatakrabbi er vanligasta slagið av krabbameini hjá monnum. Seinastu sjey árini eru millum 21 og 40 tilburðir staðfestir árliga.

Í krabbameinsdátugrunninum Nordcan ber til at finna føroysku tølini á alnetinum og samanbera tey við onnur lond.

Tølini fyri 2015 eru fyribilstøl og skulu verða tikin við fyrivarni.

*Orðalisti yvir sløg av krabbameini er á síðu 18*

## Yvirlit yvir krabbameinstilburðir 1995 – 2015

| **Yvirlit yvir cancer tilburðir 1995-2015** | |
|---|---|
| Ár | Tilburðir |
| 1995 | 180 |
| 1996 | 201 |
| 1997 | 178 |
| 1998 | 168 |
| 1999 | 183 |
| 2000 | 152 |
| 2001 | 165 |
| 2002 | 171 |
| 2003 | 167 |
| 2004 | 188 |
| 2005 | 210 |
| 2006 | 186 |
| 2007 | 198 |
| 2008 | 188 |
| 2009 | 230 |
| 2010 | 224 |
| 2011 | 195 |
| 2012 | 211 |
| 2013 | 216 |
| 2014 | 189 |
| 2015 | 235 |
| *Kelda LS 2016* | |



## Krabbamein í prostata

| Cancer C61 | |
|---|---|
| Ár | C61 |
| 1995 | 7 |
| 1996 | 11 |
| 1997 | 4 |
| 1998 | 7 |
| 1999 | 4 |
| 2000 | 4 |
| 2001 | 4 |
| 2002 | 6 |
| 2003 | 16 |
| 2004 | 13 |
| 2005 | 19 |
| 2006 | 25 |
| 2007 | 30 |
| 2008 | 27 |
| 2009 | 44 |
| 2010 | 32 |
| 2011 | 24 |
| 2012 | 36 |
| 2013 | 21 |
| 2014 | 22 |
| 2015 | 31 |
| *Kelda: LS 2016* | |




## Húð- og móðurmerkjakrabbamein

| Cancer C43 & C44 | | |
|---|---|---|
| Ár | C43 | C44 |
| 1995 | 0 | 15 |
| 1996 | 1 | 11 |
| 1997 | 0 | 10 |
| 1998 | 1 | 8 |
| 1999 | 6 | 9 |
| 2000 | 2 | 9 |
| 2001 | 1 | 17 |
| 2002 | 7 | 24 |
| 2003 | 4 | 24 |
| 2004 | 8 | 13 |
| 2005 | 7 | 49 |
| 2006 | 10 | 32 |
| 2007 | 6 | 22 |
| 2008 | 8 | 26 |
| 2009 | 2 | 23 |
| 2010 | 6 | 35 |
| 2011 | 5 | 23 |
| 2012 | 5 | 30 |
| 2013 | 3 | 38 |
| 2014 | 1 | 34 |
| 2015 | 3 | 40 |
| *Kelda: LS 2016* | | |



## Krabbamein í bróstinum

| Cancer C50 | |
|---|---|
| Ár | C50 |
| 1995 | 21 |
| 1996 | 17 |
| 1997 | 10 |
| 1998 | 15 |
| 1999 | 8 |
| 2000 | 21 |
| 2001 | 23 |
| 2002 | 23 |
| 2003 | 23 |
| 2004 | 29 |
| 2005 | 17 |
| 2006 | 17 |
| 2007 | 21 |
| 2008 | 21 |
| 2009 | 22 |
| 2010 | 25 |
| 2011 | 20 |
| 2012 | 21 |
| 2013 | 24 |
| 2014 | 21 |
| 2015 | 25 |
| *Kelda LS 2016* | |




## Krabbamein í lunga

| Cancer C34 | |
|---|---|
| Ár | C34 |
| 1995 | 9 |
| 1996 | 14 |
| 1997 | 17 |
| 1998 | 13 |
| 1999 | 10 |
| 2000 | 9 |
| 2001 | 11 |
| 2002 | 10 |
| 2003 | 10 |
| 2004 | 14 |
| 2005 | 13 |
| 2006 | 6 |
| 2007 | 15 |
| 2008 | 17 |
| 2009 | 14 |
| 2010 | 17 |
| 2011 | 12 |
| 2012 | 15 |
| 2013 | 15 |
| 2014 | 15 |
| 2015 | 19 |
| *Kelda LS 2016* | |



## Maga/tarm krabbamein

| Cancer C15, C16, C18 & C20 | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Ár | C15 | C16 | C18 | C20 |
| 2008 | 2 | 3 | 16 | 11 |
| 2009 | 1 | 5 | 12 | 11 |
| 2010 | 6 | 3 | 19 | 11 |
| 2011 | 3 | 6 | 23 | 8 |
| 2012 | 8 | 5 | 13 | 8 |
| 2013 | 8 | 2 | 14 | 14 |
| 2014 | 4 | 9 | 13 | 12 |
| 2015 | 5 | 10 | 25 | 12 |
| *Kelda LS 2016* | | | | |



## Krabbamein í undirlívinum

| Cancer C51, C53, C54 &C56 | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Ár | C51 | C53 | C54 | C56 |
| 2008 | 0 | 13 | 2 | 1 |
| 2009 | 0 | 8 | 14 | 4 |
| 2010 | 0 | 5 | 4 | 6 |
| 2011 | 0 | 10 | 2 | 5 |
| 2012 | 0 | 4 | 4 | 0 |
| 2013 | 0 | 2 | 3 | 3 |
| 2014 | 0 | 0 | 4 | 5 |
| 2015 | 2 | 6 | 5 | 1 |
| *Kelda LS 2016* | | | | |



## Krabbamein í brisi

| Cancer C25 | |
|---|---|
| Ár | C25 |
| 1995 | 1 |
| 1996 | 6 |
| 1997 | 4 |
| 1998 | 6 |
| 1999 | 6 |
| 2000 | 7 |
| 2001 | 6 |
| 2002 | 4 |
| 2003 | 4 |
| 2004 | 7 |
| 2005 | 4 |
| 2006 | 6 |
| 2007 | 6 |
| 2008 | 8 |
| 2009 | 8 |
| 2010 | 9 |
| 2011 | 5 |
| 2012 | 10 |
| 2013 | 8 |
| 2014 | 4 |
| 2015 | 5 |
| *Kelda LS 2016* | |



C-15:Cancer oesophagus
C-16:Cancer ventriculi
C-17:Tyndtarm
C-18:Tyktarm
C-19:Rectosigmiodeo
C-20:Recti
C-25:Pancreas
C-43:Móðurmerkjakrabbi
C-44:Vanligur húðkrabbi
C-34:Lungnakrabbi
C-50:Cancer mammae
C-51:Cancer vulvae
C-53:Cervix uteri
C-54:Corpus uteri
C-55:Livmoder minus specif.
C-56:Ovarii
C-61:Cancer prostatae

Kelda: Landssjúkrahúsið
Krabbameinsskráseting Føroya, Medisinski depilin.

*NORDCAN* *http://www-dep.iarc.fr/NORDCAN/DK/frame.asp*

**Heldin** er búmerkið hjá Krabbameinsfelagnum og ímyndar virðisgrundarlagið hjá felagnum. Heldin er gamalt føroyskt hjálparamboð, ið varð nýtt til hoybyrðar.

**Heldin** bæði knýtir saman og loysir byrðuna aftur.

Soleiðis roynir Krabbameinsfelagið at hjálpa tær, ið hevur ella hevur havt krabbamein, so tunga byrðan gerst lættari hjá tær og tínum at bera.